# Jólahugni heima á Garði í Hoyvík

**Eins og undanfarin ár verður skipað fyri jólahugna í útisavninum í Hoyvík. Tiltakið verður í døgunum 17. og 18. desember, og er opið millum klokkan 14 og 18 báðar dagarnar**

**JÓLAHUGNI**
*tíðindaskriv*

Vit vitja inn á gólvið í Hoyvíksgarði, sum í hesum døgum er stákaður upp til jóla. Her rýkur so væl av nýbakaðum, av føroyskum mati og fremmandum kryddaríum.

Leygardagin kl. 16.30 syngur og spælir Kári Sverrison nýggj og eldri løg, skjaldur og vísu- og kvæðaløg í stovuni í Hoyvíksgarði.

Í túninum selur Kiwanis jólatrø, meðan teymaríðing við føroyskum rossum fer fram á vegnum oman móti lendingini. Tey mongu úthúsini eru eisini eitt sindur skrýdd til jóla. Tú kanst vitja inn í fjósið og royna at mala korn á kvørnini, ella royna at gera tíni egnu jólaljós, stoyta ljós, ella ganga niðan í hoyggjhúsið við gomlum landbúnaðaramboðum og øðrum.

Ein roykurin av torvi er um geilar og tún, og torvhúsið er latið upp, tí torv var okkara største orkukeldan fyrr. Í smiðjuni smíðar jarnsmiðurin, og træsmiðurin situr og teljgir rívutindar.

Fyri børnini eru uppgávur gjørdar til eina granskingarferð kring útisavnið. Aftan á tiltakið verður drigið millum innlatnu svarleparnar, so 2 børn fáa onkran lítlan jólavinning sendandi.

Í turkihúsinum kanst tú koma inn og fáa ein fløva, og har verður kaffi, te og saft við onkrum góðum aftrurvið tilsølu. Jólasøla við heimagjørdum gávu- og prýðislutum verður eisini í turkihúsinum.

Hann sigur frá kulda og kanska kava um vikuskiftið, so børn kunnu kanska hava sleður við, tí gott er at skreiða í Kýrdali.

Heima á Garði, ella sum mong ung nú siga niðri í gomlu Hoyvík, og útisavnið í Hoyvík er ein sjáldsom perla í mentanararvi okkara. Alt lendið undir landsvegnum er av sonnum ein náttúru- og mentanarligur dýrgripur, - so nær stórbýnum og tó so langt burturi frá øllum gangi, resi og hurran.

Føroya Fornminnissavn bjóðar øllum at vera vælkomin at nýta friðin og søguna í útisavninum í Hoyvík.



*Aftur í ár verður skipað fyri jólahugna á Hoyvíksgarði*


























